# Nýtt oljufund

Oljufelagið Altinex Oil Denmark, sum millum annað umfatar fyrrverandi danska oljufelagið Denerco Oil, kunngjørdi í gjár, at felagið hevur funnið eina nýggja oljuleið í danska partinum av Norðsjónum. Leiðin er í Rau-økinum á 2504 metra dýpi. Enn er ikki greitt, hvussu stórt fundið er, men tær kanningarvar verða gjørdar nú. Fyri at gera tað lættari at staðfesta støddina hevur Altimex Oil Denmark gjørt tríggjar síðuboringar á leiðini.

# Útbjóðing loysti seg

Tað loysti seg hjá danska statinum at bjóða ferjusiglingina millum Samsø og Kalundborg og millum Bøjden og Fynshav út av nýggjum. Tað vísti seg, at tey somu reiðaríini, sum høvdu siglingina frammanundan, áttu eisini lægsta boð hesaferð, men tey vóru kortini so mikið lægri enn tey gomlu, at staturin sparir 60 mió. krónur í stuðuli til siglingina tey næstu fimm árini. Tað kemst av, at reiðaríini hava funnið øki, har tey kunnu spara.



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, fegnast um, at WHF-netið nú verður útbygt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# WHF-netið útbyggjast

**Avtala er gjørd um útbygging av VHF netinum og um uppsetan av føroyskari AIS-skipan. Eisini verður nýggj útkalliskipan keypt til sløkkiliðið**

**WHF**
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Tilbúgvingarstovnur Føroya hevur gjørt avtalu við fyritøku úr Eysturríki um útbygging av VHF-netinum, so betri útbreiðsla fæst millum oyggjarnar. Eisini er avtala gjørd um uppsetan av einari AIS-skipan at fylgja við skipaferðsluni. Harumframt er avtala gjørd um keyp av eini útkalliskipan, sum alarmsentralurin skal brúka í sambandi við útkalling av sløkkiliðum.

Í nógv ár hevur verið fýlst á, at VHF útbreiðslan millum oyggjarnar ikki er nøktandi.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, fegnast um, at komið er væl ávegis at bøta um viðurskiftini.

- Tá alt arbeiðið vónandi er liðugt á sumri komandi ár, eru íløgur gjørdar fyri 21,1 miljónir krónur yvir tvey ár fyri at nútímansgera radioútgerðina á Tórshavn Radio og at betra um trygdina á sjónum, sigur hann.

Tilbúgvingarstovnur Føroya veit at siga, at fýra nýggjar VHF-støðir verða settar upp aftrat teimum fýra verandi støðunum, sum júst eru skiftar.

- Umfatandi útrokningar hava víst, at best møgulig útbreiðsla við átta VHF-støðum fæst við at hava støðir á Eiðiskolli, Slættafjalli omanfyri Mikladal, Hálsinum við Klaksvík, Støðlafjalli í Eysturoy, Klubbanum í Fugloy, Hestinum í Suðuroy, Knúki í Mykinesi og á Sornfelli.

Nýggj stýrisskipan er uppsett á Tórshavn Radio, sum er fyritreyt fyri allari útbygginini.

Tilbúgvingarstovnurin sigur, at avtala er gjørd um uppsetan av eini AIS-skipan við 8 basisstøðum á somu plássum.

- AIS, ið stendur fyri Automatic Identification System, er ein skipan, sum veitir støðugar upplýsingar um skipaferðsluna í VHF-økinum. Skipanin kann eisini nýtast til at senda ávaringar og onnur boð til skip umframt at hava eftirlit við eitt nú boyum, vitum, aliringum og øðrum.

Eisini er avtala gjørd um keyp av alarmservara til útkalling av sløkkiliðum, sum alarmsentralurin hjá løgregluni umsitur.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um útbyggingarnar, kunnu venda sær til leiðaran á MRCC Tórshavn, tlf. 351302.

Fleiri upplýsingar um útbreiðsluna eru eisini at finna á www.mrcc.fo.

# P/F Vinnan í Gøtu

**- Sáttmálin nærkast undirskriving, men enn er endaliga støða ikki tikin til, hvar nýggja skipið skal byggjast. Tað verður antin í Noregi ella Danmark, sigur Jákup Jacobsen, reiðari í Gøtu**

**NÝBYGGING**
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo



Í eitt hálvt ella so hevur P/F Vinnan í Gøtu arbeitt við at fáa í lag ein sáttmála um nýbygging av einum kombineraðum trol- og nótaskipi.

Jákup Jacobsen, reiðari, sigur, at nú er næstan komið undir land við samráðingum um ein sáttmála.

Hann heldur, at sum útlitini eru í løtuni nærkast ein sáttmáli undirskriving, men kortini hevur felagið í Gøtu ikki endaliga tikið støðu til, hvar skipið skal byggjast.

- Tað verður antin í Noregi ella Danmark, sigur hann.

Spurdur, um hugsandi er, at skrokkurin verður bygdur aðrastaðni, sigur reiðarin, at tað er nakað, sum skipasmiðjan, ið fer at byggja skipið, tekur støðu til, men tað er ikki óhugsandi.

Felagið í Gøtu hevur heldur ikki gjørt av, hvussu flotin, sum felagið eigur, verður skipaður, tá nýggja skipið kemur í flotan.



*Saksaberg hevur higartil gjørt tríggjar túrar á sild, og í dag landaði skipið umleið 220 tons til Kollafjord Pelagic*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Møgulig umbygging

- Samstundis, sum vit arbeiða við at fáa byggisáttmálan undir land, umhugsa vit eisini onkra umbygging.

Jákup vil tó ikki neyvari siga, hvør umbygging talan kann vera um, men vísir á, at Tróndur í Gøtu er vorðin stívliga 20 ára gamal og krevur meira viðlíkahald nú enn áður.

- Finnur Fríði, sum er nýggjasta skipið hjá okkum, verður sum hann er. Hann hevur riggað og roynst sera væl, og man teljast millum bestu skip í hesum skipabólki.

Finnur Fríði hevur tvey veiðiloyvir.

Aftrat Tróndi í Gøtu og Finni Fríða, eigur felagið í Gøtu Jupiter og Saksaberg, sum eisini hevur síni veiðirættindi til svartkjaft umframt 40% av sild og nakað av makreli.

P/F Vinna eigur eisini veiðirættindini hjá Krúnuni, sum felagið keypti.

- Vit skuldu tískil havt pláss fyri einum skipi aftrat í okkara flota, sigur Jákup Jacobsen.

## Skjótt á sild

Kombineraðu nóta- og trolskipini eru í løtuni á svartkjafti, men væntandi er, at tey fara á sild nakað skjótt.

- Saksaberg hevur higartil gjørt tríggjar sildatúrar, og í dag landar skipið umleið 220 tons í Kollafirði.

Reiðarin í Gøtu sigur, at sildin enn er soltin eftir gýting, men sum tíðin gongur, kemur meira upp á hana, samstundis sum hon